# Takka við íslendskum jólastjørnum

**Farna vikuskifti vóru tveir íslendingar í Føroyum, við tí endamáli at bera tøkk fyri lánið, ið Føroyar veittu Íslandi. Hannes Kristmundsson, greiðir frá at lánið gav íslendingum vón, um at teir ikki eru einsamallir í verðini**

TØKK
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*



*Fyri Jústinus og Alisu, sum búgva har, merkja blómurnar, at nú nærkast jólini av álvara. Íslendska gávan er kærkomin*
*Mynd: Bergur Johannesen*

Føroyingar veittu grannunum í útnorðingi eitt lán í teirra svárastu tíðum, og tað merkist, tí Íslendingar hava gjørt sítt ítasta fyri at sýna takksemi. Hannes Kristmundsson, rithøvundur greiðir frá, at lánið var meira enn bara fíggarligur stuðul, lánið var ein moralskur stuðul, ið gevur íslendingum vón.

- Vit hava verið um og spurt um hjálp, men eingin rætti okkum eina hond. Men við eitt komu Føroyar, uttan at vera umbidnar, og veittu okkum hjálp.

Hann og Pétur Hafsteinn Lárusson, sum rekur eitt vakstrarhús fingu hugskotið at sýna takksemi. Uppundir jólini eru altíð nógvar jólastjørnur í vakstrarhúsinum, so teir ynsktu at koma til Føroya at gleða eldra ættarliðið við hesum.

## Lágargarður prýddur

Íslendingarnir báðir vitjaðu farna vikuskifti eldrasambýlið Lágargarð í Havn. Sigrun Ørvarodd, ið starvast sum køkshjálp har greiðir soleiðis frá,

- Seinasta leygardag, meðan vit gjørdu salin tilreiðar, bankaði brádliga á dýrnar. Íslendingarnir báðir komu ófráboðaðir við nógvum jólastjørnum. Teir komu har tað var ljós, og ikki gjøgnum høvuðsdyrnar. Tær 16 jólastjørnurnar, reyðar, grønar og ljósareyðar, eru býttar út á eindirnar, tí tað var ein felags gáva.

Hon greiðir frá, at á einum seðli á blómunum var eitt íslendskt flagg saman við Merkinum, sum tekin upp á vinarlag. Okkurt av búfólkunum hevði lagt hetta tilmerkis, og gleddist um gávuna. Hon leggur afturat, at summi av búfólkunum vita so væl til sín, at tey kenna til lánið og hví hendan gávan er komin.

Í alt høvdu íslendingarnir 300 jólastjørnur við sær, ið eru býttar út kring landið.

- Vit kendu bara ein tørv at takka føroyingum fyri hetta, sigur Hannes Kristmundsson.

Fyri búfólkið og starvsfólkið á Lágargarði var gávan kærkomin og ein sonn gleði fyri stovnin.

Hygg at topp fótbólti frá teimum størstu ligunum, millum annað Premier League, Seria A og La Liga



Tilboð 339,- kr. um mðr

FAMILY VIÐ CANAL+ TOTAL 369 kr./md.*
HDTV-kanaler
NYHED

Hvør loysn passar best til tín tørv?

GOTT
Digital sjónvarpsboks: 495 kr.
Sjónvarpsboksin vísir okkara bestu kanalir í flottari digitalari góðsku.



BETRI
HDTV boks: 995 kr.
Við hesi HDTV boksini hevur tú møguleika at síggja HDTV í sera høgari HD-góðsku.



BEST
HDTV boks v/ harddiski: 1.995 kr.
Við hesi HDTV boksini kanst tú síggja HDTV í sera høgari HD-góðsku, umframt at tú kanst pausa, spola og taka upp.



Fyri at síggja FAMILY MED CANAL+ TOTAL skal tú hava eina parabol 1.195 kr.



*Tilboðið inniber 12 mðr. hald av FAMILY MED CANAL+TOTAL. Goldið verður fyri TV-pakkan, hálvt ár av korttænastu, umframt uppræating á 390 kr. + seinna hálvár av korttænastu á 389 kr.

Canal Digital

RADIOHANDILIN
N. Finsensgøta 16
Tórshavn
Tel. 318277

OPUS
Heiðavegur 3
Runavík
Tel. 479999

G.F. ELEKTRONIK
Birnugøta 31
Tórshavn
Tel. 310254

MP TEKNIK
Bumshamarsvegur 7
Klaksvík
Tel. 459089

expert - vit vita
Húsagøta 2
Tórshavn
Tel. 353535

RADIO SERVICE
Vágur
Tel. 213500

el·in
Klingrugarður 8
Klaksvík
Tel. 474500